# Tá ið mentanir hittast


*SJÓFARARI, ÆVINTÝRARI OG HØVUNDUR. Durita Holm býr nú í lítlu bygdini Monachil í Suðurspania saman við manni sínum Erik og dóttrini Freyu.*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Øll hava gott av at uppliva aðrar mentanir, og tað er eingin forðing at hava børn, tá ið tú slítur teg leysan. Tað sigur Durita Holm, sum hevur skrivað eina bók um sítt lív í einari lítlari Suðurspanskari bygd nevnd Monachil. Eitt evni í bókini er um ymsar mentanir, sum hittast, og Durita eggjar til humanismu og tolsemi**

FERÐAFRÁSØGN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Durita Holm hevur aftur gjørt tað. Hon hevur kastað seg út í eitt nýtt ævintýr og skrivað eina bók um sínar upplivingar.

Hon gjørdist kend, tá hon sigldi kring jørðina í trý ár. Á ferðini hitti hon Erik og saman fingu tey dóttrina Freyu, sum hon átti á ferðini. Nú býr lítla familjan í einum gomlum, hvítt-kálkaðum húsum í einari lítlari fjallabygd undir teimum høgu og stórslignu Sierra Nevada tindunum í Suðurspania. Og tað hevur hon skrivað eina bók um.

Bókin kallast »Á smølum andalusiskum gøtum«. Durita fortelur um lívið í bygdini, um fólkini, teirra søgu, sermerki og upplivilsini, sum standast av at liva millum fólk við eini heilt øðrvísi mentan.

– Karmurin um bókina er okkara lív. Tað tætta og tað, sum vit uppliva dagliga. Smáar anekdotir. Men eg royni eisini at bakka eitt sindur út og sigi frá søguliga upprunanum hjá hesum fólkum. So tað er eitt sindur ping-pong aftur og fram. Vónandi verður lesarin fangaður av tí, so hann eisini lærir eitt sindur, sigur Durita Holm.

Í grundini er bókin skrivað, tí forlagið Borgen var so væl nøgt við fyrru bókina um ferðina kring gongustjørnina. Men Durita hevur eisini ein boðskap við hesi bókini. Hon vil fortelja fólkum, at pláss er fyri øllum í heiminum.

– Kanska er bókin mest um, hvat hendir, tá ið mentanir hittast. Hetta er ikki ein politisk bók, men eg hava sum mál at eggja til humanismu og tolsemi millum fólk. Vit tosa øll um globaliseringina, men heimurin hevur ilt við at venja seg við hana. Tað kann hesin landsluturin kanska læra fólk eitt sindur um, sigur Durita Holm.

## Meldur av virðum

Sjálvt møtið millum ymsar mentanir hevur stóra áhugan hjá Duritu og í so máta er Andalusia eitt sermerkt øki. Í 800 ár var hálvoyggin meira ella minni muslimsk, og bókin fer aftur í søguna. Greitt verður frá mentanini hjá maurunum, sum var ein blómandi fyrimynd hjá restina av Evropa, til tey kristnu, øst av tankanum um heilagt kríggj, endurhertóku oynna í 1492.

– Í hesum landslutinum livdu muslimar, jødar og kristin lið um lið. Alt økið blómaði nettup í meldrinum av ymiskum áskoðanum og virðum. Fólk livdu saman og stuðlaðu hvørjum øðrum. Hetta var eitt gott gróðrarlendi fyri menning, og tað kundu vit lært nógv av í dag, sigur Durita Holm.

Men bókin snýr seg eisini um so nógv annað, leggur Durita dent á. Hon filosoferar um lívið og um tað at liva, so tú verður nøgd, og hon snýr seg um tað at velja. Hon og familjan valdu at fara til Andalusia, tí tey fullu fyri náttúruni, umhvørvinum og góða veðrinum.

– Vit hava ferðast nógv og vildu gjarna fordjúpa okkum í einari aðrari mentan. Her eru høg fjøll, vit kunnu standa á skíð ella fara á strondina. Býurin Granada, sum liggur beint við, er fantastiska vakur, so vit fáa møguleika at uppliva bæði bygd og bý, sigur hon.

## Børn ongin forðing

Sjálv hevur Durita valt at liva akkurát soleiðis, sum hon hevur hug. Í løtuni fjarlesur hon fólkalívsfrøði í Oslo, hon býr í Spania og skrivar eina bók um seg sjálva, sína familju, grannarnar og heimin.

Alt hetta hendir, meðan hon er mamma og hevur ábyrgdina av einum barni, sum skal alast upp. Men tað er als eingin forðing, leggur hon eina við.

– Tað er einki problem! Øll kundu gjørt tað. Serliga tey, sum búgva í Havn, tí tey kunnu leiga húsini út, sigur hon og flennir. Børn eru eingin forðing. At flyta runt í heiminum og uppliva er mennandi fyri bæði børn og vaksin, sigur Durita.

Seks ára gamla Freya, sum hevur langt og ljóst hár, stórtrívist millum sínar myrku sponsku vinir, hevur lært málið og gongur í skúla. Hon hevur hvørki Nintendo, video ella teldu-spøl, og tað dámar Duritu væl.

– Eg vil ikki vera ein partur av tí materiella trýstinum, sum liggur á børnum í Oslo og sikkurt eisini í Føroyum, sigur hon.

## Minni jantelóg

Durita fær tíðina at ganga við at lesa, skriva og dyrka grønmeti, ganga og súkkla túrar. Og uppliva. Náttúran er ein inngrógvin partur av henni, og her sær hon havsbrúnna hvønn dag. Tað er alneyðugt, tá tú kemur úr Føroyum, heldur hon, men annars vil hon vera við, at fólkini á ein hátt hava víðari sjónarring enn føroyingar.

– Her er minni jantelóg. Eg haldi, tað hongur saman við, at protestantisman, sum er ráðandi í Føroyum, sigur okkum, at øll eru líka fyri Gudi. Soleiðis er ikki hjá katolikkunum. Í Føroyum halda vit, at øll eru líka og dyrka tað. So skal eingin halda seg vera nakað meira. Er okkurt øðrvísi við okkum, so halda vit tí aftur. Hjá teimum er øvugt. Her eru tey absolutt ikki líka, og tað leggja tey dent á. Her vísa tey, at tey eru fátæk, rík ella eiga jørð. Um tey eru høg ella lág. Tað ymisliga er náttúrligt. Tey góðtaka til dømis, at eg gangi í stuttum kjólum og drekki øl, tí eg komi frá einari aðrari mentan, sigur Durita Holm, sum heldur, at vit kundu lært eitt sindur av tí.

Durita hevur lagt leiðina hendan vegin, tí bók hennara skal leggjast fram. Føroyska útgávan er longu í bókabúðunum. Í dag kemur hon út á donskum, og Durita skal á bókastevnu at leggja hana fram. Við sær á ferðini hevur hon dóttrina Freyu. Maðurin er í Noregi, har hann leggur sína egnu bók fram. Skjótt fara tey aftur til Suðurspania, har tey ætla sær at vera nøkur ár.

Tað er einki problem!



# Diddl og Pimpoli í SMS leygardagin



**Um tú vil tryggja tær ein Diddl vinaposa við ymiskum Diddl lutum í, mást tú fara í Griffilin hós- og fríggjadagin at keypa atgongumerki**

VITJAN
*Tíðindaskriv frá SMS*

Ein klemmandi heimskend ostaetandi lopmús við loplabbum og ein klemmusjúk teddybjørn úr lítlari bygd í Útsynningsklemmugolia vitja í SMS 22. november. Diddl og Pimboli koma við Atlantsflog og Griffilin skipar fyri vitjanini í SMS.

Diddl er ein springmús. Kanska ein lopmús. Ella hoppimús. Í øllum førum er Diddl ein fitt lítil mús við stórum hjarta, sum altíð er í góðum lag. Tað, ein best leggur merki til, eru labbarnir. Diddl hevur springlabbar. Kanska loplabbar. Ella bara hoppilabbar. Teir kann hann brúka til at hoppa frá einum staði til annað og klemma øll, sum hava tørv á tí. Hann fær øll onnur í gott lag, elskar ævintýr og at fáa sær ein ostabita á Diddlverkstaðnum, ella at liggja í bønum og telja løgin skýggj, sum síggja út sum lomb, saman við unnustuni Diddelinu.

Pápi Diddl eitur Thomas Goletz. Hesin Tummas teknaði Diddl fyri fjúrtan árum síðan, og síðan tá hevur Diddl havt eina rúgvu av fjepparum. Diddl er so fittur og so stuttligur, at ikki bara børn, men eisini vaksin og eldri, fullkomiliga eru fallin fyri hesum sjarmutrølli.

Tað er in og sakin at samla upp á Diddl. Ein kann keypa nógv ymiskt, men aðrastaðni hava tey eisini Diddl Umbýtisdagar, har øll kunnu hittast og býta um, um tey nú eiga tvey av einum og einki av einum øðrum. Og so eru

Diddlkappingar. Og Diddlpennavinir. Og mann kann eisini senda teldupost til Diddl.

Ein av bestu vinunum hjá Diddl eitur Pimboli. Hann er ein teddybjørn. Hann varð føddur í eini lítlari bygd í Útsynningsklemmugolia. Hann er seinførur og klossutur og gloymskur og má helst klemmast allan dagin. Han er øgiliga fittur.

Nú kunnu føroysk børn hitta Diddl og Pimboli. Tann 22. november millum kl. 10.00 og 12.00 verða teir báðir í SMS. Har verður høvi at hitta teir, taka myndir saman við teimum, keypa vinarposar við diddllutum, har verða kappingar og millum kl. 12.00 og 14.00 verður eisini býtiløta, har børnini kunnu taka sínar Diddl lutir við í SMS og býta um við onnur. Atgongumerki á kr. 25,-, sum tryggja tær ein Diddl vinaposa, sum inniheldur Diddl bomm, eitt Diddl vinaband, eitt serligt prent av tí vælumtókta Diddl A5 blokkinum, umframt eitt Diddl dupultkort við eini mynd av tær saman við Diddl og Pimpoli, fáast í Grifflinum hósdagin 20. og fríggjadagin 21. november. Ikki seld atgongumerki verða so eisini seld leygardagin frá kl. 9.00. Avmarkað nøgd.

Tað eru SMS, Griffilin og Atlantic Airways, sum skipa fyri.


## Landsfundur 2003
**í Hvalba 21. og 22. november**

**Fríggjakvøldið 21. nov.**
kl. 19.30 Landsfundurin settur
Góðkenning av fundarskipan
Val av fólki til fundarskipan
kl. 20.00 Frágreiðing skrivarans
Orðaskifti um frágreiðingina
kl. 20.30 Frágreiðing frá feløgunum
kl. 22.00 Gestarøðari Hanus Kamban
kl. 23.00 Fundur niðurlagdur

**Leygardagin 22. nov.**
kl. 09.00 Formansfrágreiðing
kl. 10.00 Aðalorðaskifti
kl. 12.00 Matarsteðgur
kl. 13.00 Evnisorðaskifti
- Vælferðarsamfelag og høgrasnaring
- Reyð-grøn dagsskrá
- Eldrapolitikkur og serforsorgin
- Privatiseringar og søla av alm. ognum
kl. 15.00 Val av starvsnevnd og floksleiðslu
kl. 16.00 Ymiskt, innkomin uppskot
Landsfundarsamtykt

**Landsfundarveitslan** verður kl. 19.30 í Roynhøllini

**Føroya Javnaðarflokkur**

Sosialurin 341800



Der neue Golf

ist hier




30 ár og stívliga 20 milliónir nøgdar Golf-eigarar eftir, at fyrsti Golfurin kom av verksmiðjuni í Wolfsburg, verður 5. útgávan givin út. Der neue Golf verður frumsýndur um alt Evropa í døgunum 15. og 16. november. Áhugað kunnu venda sær til Bilasøluna á tel. 315354

Bilasølan við Øssur Johannesen, Vegurin langi, 315354

team85